# Vit standa øksl við øksl

**Arbeiðarafeløgini standa sum ein maður og tað var ongin ivi um at semingsuppskotið skuldi vrakast**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Samanhaldið ímillum arbeiðarafeløgini hevur verið fyrimyndarligt, sigur Ingeborg Vinther*

– Samanhaldið hevur verið ótrúliga gott. Vit standa sum ein maður.

Nú verkfall er lýst um alt landið, ásannar Ingeborg Vinther, at samanhald gevur styrki.

Øll fimm arbeiðarafeløgini í landinum hava lagt arbeiðið niður og forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað var ongin slingur í valsinum, tá ið støða skuldi takast til semingsuppskotið týskvøldið.

– Tað var so vánaligt, at tað kundi ikki koma uppá tal at góðtaka tað, sigur hon.

Semingsuppskotið líktust mest tilboðnum frá arbeiðsgevarunum og tað kundu vit ikki góðtaka. Kravdu okkum niður um 10 krónur

Ingeborg Vinther sigur, at upprunaliga kravdu arbeiðarafeløgini 12 ,60 krónur um árið í tvey ár.

– Men fyri at fáa samráðinagar í gongd, slakaðu vit niður á 8, 24 krónur um árið, men tað segði tað sama.

– Vit loraðu nakað afturat týskvøldið fyri at fáa gond á, men semingsmaðurin gjøri okkum púra greitt,at vit skuldu í hvussu so er niður um 10 krónur árið í lønarhækking tilsamans.

Ingeborg Vinther sigur, at sostatt ljóðaði semingsuppskotið uppá 3,20 um árið í tvey ár, ella 6,40 tilsamans Ingeborg Vinther sigur, at hetta er nógv minni enn tey fingu seinast, tí tá ið tey fingu yvir 10 krónur tilsamans.

Sostatt tók tað onga tíð at taka støðu til semingsuppskotið.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, er púra samdur við Ingeborg Vinther.

– Endamálið við verkfallinum er púra greitt og tað er at forða fyri at lønarmunurin ímillum arbeiðsfólk og tær hægru lønirnar vekstur og at stættarmunurin sostatt eisini veksur.

Hann sigur annars, at tað hevur gingið væl at skipa fyri verkfallinum.

Tey høvdu fólk á vakt alla hósnáttina, men tað vóru ongir trupulleikar.

Norrøna fór av landinum sum vant hóskvøldið, men ongin farmur slapp við.

– Tríggir bilar, sum vóru komnir við byggitilfarið til Føroya Tele royndu at sleppa niður aftur við.

– Tann eini bilurin var farin umborð, men tá ið hinir báðir bilførararnir fingu at vita, at verkfall var og at teir ikki sluppu umborð, góðtóku teir tað, uttan at blunka, sigur Hans Joensen. Føroyskt brak á Fólkatingi.

Nú skulu hernaðarlógirnar, sum vóru settar í gildi fyri Føroyar, standa sína roynd á Fólkatingi. Eitt samt løgting vil burturbeina lógirnar, sum lýstar beint ímóti føroyskum vilja.

# Vit fara ikki at nokta børnum at fáa mjólk

**Tað er ein misskiljing, tá ið sagt verður, at ongin mjólk verður at fáa, íméðan verkfall er, tí mjólkin hevur fingið undantaksloyvi**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Allan samlan hósdagin var tað endurtikið ferð eftir ferð íméðan verkfallið er, verða bøndurnir noyddir at stoyta mjólkina á sjógv.

Orsøkin skuldi vera, at teir, sum koyrdu mjólk og tey, sum arbeiða á mjólkarvirkinum, vóru í verkfalli. Sostatt skuldi heldur ongin mjólk vera at fáa í handlunum kring landið.'

Hetta er ein stór misskiljing.

– Vit fara ikki at nokta børnunum mjólk, siga arbeiðarafeløgini púra samd.

Tey siga, at tey hava givið mjólkini undantaksloyvi so at mjólk verður at fáa sum vanligt.

Teir, sum koyra mjólk, hava fingið undantaksloyvi at heint mjólk hjá bøndrunum kring landið. Strandfaraskipini hava fingið undantaksloyvi at føra mjólk og tey, sum arbeiða á mjólkarvirkinum, hava fingið undantaksloyvi at arbeiða mjólkina.

Sostatt verður mjólk at fáa kring alt landið íméðan verkfall er, akkurát sum vanligt

Men arbeiðarafeløgini gera samstundis greitt, at verður undantaksloyvið misbrúkt, verður tað aftúrtikið alt fyri eitt.

– Undantaksloyvi umfatar bara mjólkarvørur. Verður tað misbrúkt til at flyta aðrar vørur kring landið í bilunum, sum koyra mjólk, verður flutningurin steðgaður alt fyri eitt, leggja arbeiðarafeløgini í verkfalli dent á.

### Skipini sigla

Annars sleppa bæði Norrøna og Smyril at sigla ótarnað, men treytin er, at tey ikki flyta frakt. Gera tey tað, verða tey løgd við brestin.

# Fara út av eggini við fullum lumma av pengum

**Jan Mortensen á Føroya Arbeiðsgevarafelag væntar eitt drúgt verkfall**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Verða lønarkrøvini hjá arbeiðarafeløgunum eftirlíkað, hevði føroyski búskapurin kollsiglt uppá heilt stutta tíð.

Jan Mortensen á Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at tað kemur aldrin upp á tal at ganga krøvunum hjá arbeiðarafeløgun um á møti.

– Gera vit tað, koyra vit føroyingar út av eggini. Og so nyttar tað lítið, at vit fara útav við fullum lumma av pengum, sigur hann.

Hann sigur, at lønarhækkingarnar í Føroyum hava verið ógvuliga stórar seinastu árini.

– Og tað ber ikki til at hækkinginarnar skulu halda fram við somu ferð. Verða lønarhækkingarnar í Føroyum áhaldandi nógv størri enn í londunum rundanum okkum, missa vit kappingarførið og so eru vit í kreppu av álvara.

Hann sigur, at við 99% av tí, vit liva at, er fiskur og laksur, sum vit flyta út og tí er tað umráðandi hjá okkum at varðveita kappingarførið, annars máa vit støðið undan búskapinum.



*Verða lønarkrøvini hjá arbeiðarafeløgunum eftirlíkað, fer tað at kollsigla føroyska búskapin uppá nakrar mánaðir, sigur Jan Mortensen á Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Sostatt kemur tað aldrin upp á tal at góðtaka eina lønarhækking sum líkist tí, ið arbeiðarafeløgini hava kravt.

– So ger tað ikki mun um maskinmeistararnir hjá SEV sløkkja ljósið ella ikki, tí tá verða Føroyar sløktar kortini, sigur hann.

Jan Mortensen sigur, at tískil væntar hann eitt drúgvt verkfall.

– Tað er lítil ivi um, at verkfallið verður drúgt, sigur hann.

Hann sigur at sjálvsagt kostar eitt verkfall vinnulívinum nógv

– Men Arbeiðsgevararnir hava tvinnar kostir:

Antin velja teir tað løttu loysnina og góðtaka krøvini fyri at sleppa undan verkfalli og sostatt fáa ein løtuvinning.

Hin kosturin er at taka samfelagsatlit og at taka slagið nú, fyri at bjarga búskapinum í longdini.

Hann sigur, at arbeiðsgevararnir velja seinnu loysnina.

### Stórur munur

Jan Mortensen sigur, at upprunaliga vildu arbeiðsgevararnir lata 2,5% í lønarhækking um árið í tvey ár. Hinvegin kravdu arbeiðarafeløgini 16,48 krónur, sum svarar til 17,9%.

– Eftir semingsuppskotinum skuldi lønarhækkingin verða útvíð 7% tilsamans tey bæði næstu árini og tað góðtóku arbeiðsgevarafelagið.

Arbeiðarafeløgini halda, at Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur havt størri leiklut í hesum samráðingum, enn gott er?

– Vit leggj a okkum ikki út í, hvat Karsten Hansen ger. Men arbeiðsgevarafeløgini hava sagt, at sáttmálin ímillum SEV og maskinmeistarafelagið, sum gav sløk 11% tilsamans í tvey ár, hevur lagt støðið. Nú Fíggjarmálaráðið hevur ógildað tann tann sáttmálan, er tað trupult at verja so stór lønarkrøv, sum arbeiðarafeløgini eru komin við.

– Tey kunnu hvørki verjast í búskaparligu gongdini, prísvøkstrinum ella í lønarhækkingunum í grannalondum okkara, sum eru væl lægri enn í Føroyum, sigur Jan Mortensen.